# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Halldór Olafsson

**9. apríl 1912 - 7. mai 2006**



Sunnukvøldið 7. mai andaðist Halldór Olafsson í Havn á Landssjúkrahúsinum 94 ára gamal.

Halldór Olafsson var ættaður av Viðareiði. Foreldrini vóru: Sára, f. Joensen, ættað av Skælingi, og Olaf Joensen av Viðareiði.

Halldór var elstur av seks systkjum, hini systkini eru: Arni, føddur í 1914, hann doyði í 1936, bert 22 ára gamal, sigldi við skipið hjá A.P. Møller og bleiv sjúkur av lungnabruna og doyði í Keypmannahavn, her hann eisini er grivin. Síðan er tað Brynhild, f. 1916, giftist Stefani Absalonsen av Viðareiði, tey búsettust í Klaksvík. Herborg, f. 1918, giftist Gunnari Gunnarsson úr Vági, tey búsettust í Havn. Solveig, f. 1920, giftist Håkon Joensen úr Sumba, tey búsettust í Havn. Yngstur var Heini, f. 1922, hann giftist Mariu í Gong, tey fingu sær eftirnavnið Svarthamar og búsettust eisini í Havn. Í dag eru bert Brynhild og Solveig eftir á lívi.

Hesi systkini vóru fyri tí lagnu at missa mammuna tíðliga, hon doyði frá teimum í september 1928, bert 45 ára gomul. Halldór var tá 16 ára gamal og Heini bert 6 ár. Halldór var til skips við sluppini Svínoynni, og hann fekk ikki boðini um at mamman var deyð, fyrr enn skipið var komið á Klaksvík eftir loknan túr um heystið. Hetta tók honum sera fast, og hann yrkti seinni sangin „Móðurminni" til mammu sína. Sangurin stóð í Dimmalætting í 1938.

Í 1933 fór Halldór, sum 21 ára gamal, suður til Vágs til pápabeiggjan Martin Joensen, sum hevði skaffað honum arbeiði har. Hann arbeiddi tann veturin í Vági og fór so til skips sum kokkur við sluppini „City of Norwich", har Gunnar Danielsen, ið seinni bleiv verpápi hansara, var skipari.

Halldór giftist í 1938 Onnu Malenu, vanliga nevnd Lena, dóttir Ingu, f. Jacobsen, og Gunnar Danielsen, sum bæði vóru úr Søldarfirði, men høvdu sett búgv í Vági.

Í 1940 legðist Halldór upp á land og fór at handla í teirra egnu húsum í Vági.

Í 1942 fingu tey sonin Árna, sum í dag býr í Keypmannahavn. Hann er giftur Onnu, f. Johannesen, av Skála. Tey eiga dóttrina Maluna.

Í 1958 flutti familjan til Havnar at búgva, har Halldór hevði egna heilsølu, til hann gavst fyri aldur í 1984.

Lena doyði av krabbameini í 1967, 54 ára gomul, og Halldór giftist upp aftur við Sunnevu Lindal úr Kunoy. Tá Sunneva gjørdist sjúk og doyði 81 ára gomul í 1997, gjørdist Halldór einkjumaður fyri aðru ferð. Hann náddi at halda silvurbrúdleyp við bæði Lenu og Sunnevu.

Halldór var evnaríkur maður, hann las nógv og fylgdi væl við í øllum sum fór fram, bæði her heima og úti í heimi. Hann var eisini stinnur í skriftunum. Í samkomuni í Ebeneser var hann í mong ár ein av stuðlunum. Hann boðaði evangeliið og var mangan tulkur hjá vitjandi talarum, sum tosaðu enskt, sum hann sjálvur hevði lært seg til lítar. Eisini umsetti og yrkti hann onkrar sangir.

Halldór var ein sermerktur persónur, hann hugsaði sjálvstøðugt, hevði sínar avgjørdu meiningar og var ikki bangin fyri at siga tær.

Seinasta hálvtannað árið búði Halldór á Tjarnargarði. Tað var hann sera glaður og takksamur fyri, nú árini vóru vorðin so mong, og heilsan var farin at bila.

## Samverkamenn við summarliði til Birmingham

TÍÐINDASKRIV



Aftur í ár skipar trúboðanarfelagsskapurin Samverkamenn fyri einum summarliði í Birmingham í Onglandi frá 7. til 17- juli. Fyrstu ferð skipað var fyri einum slíkum túri var í 2005, tá 10 føroyingar luttóku.

Birmingham er næststørsti býur í Onglandi við umleið 5 milliónum íbúgvum.

Miðbýurin er sera áhugaverdur og væl egnaður til evangelisering. Har eru nógv ymisk fóklasløg við øllum heimsins átrúnaði, sum t.d. muslimar, hinduar, buddistar og sikhar.

Ein av háttunum at evangelisera upp á er at seta upp bókaborð við traktatum og ymiskum kristnum lesnaði. Hetta verður serliga gjørt fyri at koma í samband við fólk.

Umframt at tey á summarliðunum tosa við fólk í gøtunum, fáa tey eisini undirvísing í islam, hinduismu og sikhismu, soleiðis at tey fáa eitt innlit í hvat hesir trúarbólkar standa fyri. Eisini verður vitjað í eini mosku, og einum hindu- og einum sikhtempli, har víst verður runt, og høvi verður at seta leiðarunum spurningar.

Ein av døgunum verður skipað fyri einum dagstúri til Alton Towers, ið er ein av heimsins størstu stuttleikaparkum.

Eitt av endamálunum við hesum túrinum er at tey sum eru við á summarliðnum fáa eina smakkiroynd av hvussu arbeiði millum asiatar og muslimar gongur fyri seg. Fólk í øllum aldri hava møguleika at vera við.

Farið verður úr Vágum fríggjadagin 7. juli, og komið verður aftur í Vágar mánadagin 17. juli. Áhugaði kunnu venda sær til Janus Gunnarsson: janus@samverkamenn.org ella Sjúrð Olsen, tel. 226692.

Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.samverkamenn.org.

**Dagurin í morgin**

**18. mai. Eirikur**, deyður umleið 1160. Svenski kongurin Eirikur IX Jeðvarðson, sum varð myrdur av danska prinsinum Magnusi og hansara monnum í Uppsala dómkirkju. Eirikur varð virdur sum svenskt tjóðhalgimenni alla miðøld. Navnið er norrønt og merkir hann sum ræður eina ella æviga.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Josefina Højsted, Funningur**, andaðist 15. mai, 100 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju hósdagin kl. 14. Sungið verður verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Josefinu, kunnu lata Funnings kirkju eina gávu. Konto í Føroya Sparikassa.

Kistan við **Hans Petur Djurhuus**, fyrrverandi skipasýnismanni, ættaður av Nesi í Vági, búsitandi í Tórshavn, fer úr Landssjúkrahúsinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin kl. 14. Tey, sum vilja minnst Petur kunnu lata Zarepta eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, vermamma og omma okkara

**Mia Larsen**
Tórshavn, ættað úr Kvívík

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 14. mai, 87 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin 18. mai kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 19. mai kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Marjun, Kinna og Kristjan**

*Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata eina peningagávu til Amnesty International, konta í peningastovnunum.*

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu í stóru sorg okkara, tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jóhan Magnus Ennistíg**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður,

takka vit hjartaliga.
Tøkk fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í Betesda.
Tøkk til tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðina og evið.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Zarepta.
Og tøkk til øll tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Poula**